FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

**Argir**, 14. januar 2016

**J.Nr.:** 16/00017-1
**Tygara skriv:** 18/2015

# Fyrispurningur um børn í fátækraváða, settur Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

## Jenis av Rana, løgtingsmaður

1. Hvørji hagtøl hevur landsstýriskvinnan, sum vísa, at talið av børnum í fátækraváða vaks undir farnu samgongu?
2. Hvussu síggja prosentvísu tølini yvir børn í fátækraváða út ár fyri ár í tíðarskeiðnum 2010 til 2015?
3. Hvørji fíggjarlig markatøl liggja til grund fyri umtalaðu meting av fátækraváðanum fyri hvørt einstaka árið?

## Svar

### Til nr. 1

Ein ábending er, at sambært Hagstovuni hækkaði prosentparturin av stakum uppihaldarum í fátækraváða, har yngsta barnið er 0-5 ár – í mun til samlaða talið av støkum uppihaldarum, har yngsta barnið er 0-5 ár – úr umleið 54% í 2010 upp í 68,4% í 2013.

Hagtøl hjá Hagstovuni vísa somuleiðis, at fyri stakar uppihaldarar í fátækraváða, har yngsta barnið er 6-17 ár, hækkaði prosentparturin úr 30,6% í 2010 upp í umleið 36% í 2013.

Ein onnur ábending er, at átakið "í menniskjum góður tokki" síðstu árini hevur sagt frá vaksandi tørvi á jólahjálp til barnafamiljur, ið eru illa fyri fíggjarliga.

### Til nr. 2

Hagtøl eru ikki tøk, sum vísa prosentvísu tølini yvir børn í fátækraváða fyri øll árini í tíðarskeiðinum 2010 til 2015, men til og við 2013. Ein ábending er kortini talvan niðanfyri, sum vísir prosentvísu tølini yvir stakar uppihaldarar í fátækraváða, í mun til stakar uppihaldarar sum heild í hvørjum bólki, býtt á ár og býtt á aldur á yngsta barninum.

| Prosentpartur í fátækraváða | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|
| *Stakur uppihaldari – yngsta barn 0-5 ár* | 53,5 | 63,2 | 59,5 | 68,4 |
| *Stakur uppihaldari – yngsta barn 6-17 ár* | 30,6 | 30,4 | 34,9 | 35,8 |

Kelda: Hagstovan.

Verandi stjórn og samgonga hava longu framt fleiri átøk fyri í størri mun at tryggja, at børn ikki vaksa upp í fátækraváða í Føroyum frameftir. Tí eru m.o. fylgjandi átøk sett í verk frá 1. januar 2016:

- Ískoyti til familjur, sum hava børn undir 18 ár. Hægsta ískoyti til stakar uppihaldarar við einum barni og við einari ársinntøku lægri enn 190.000 kr. er 18.000 kr. Eru fleiri børn, hækkar ískoytið 5.000 kr. fyri hvørt barnið.
- 137 mió. kr. til skattalætta til lág- og miðallønt,
- Kringvarpsgjaldið til stakar uppihaldarar lækkað úr góðum 3.600 kr. árliga niður í 1.800 kr. árliga.

Hartil verður eitt nú arbeitt við at fáa fleiri leigubústaðir tøkar til rímiligar kostnaðir umvegis Bústaðir.

### Til nr. 3

Parturin av fólki í fátækraváða er í hesum føri sambært ES mátinum tann parturin av fólkunum, sum hevur minni inntøku enn 60% av miðinntøkuni. (Miðinntøkan er tann mittasta inntøkan. Helvtin av borgarunum hevur størri inntøku og helvtin minni. Hetta er vanliga nýtta mátið.)

Tøka inntøkan eftir skatt verður brúkt sum grundarlag fyri at rokna fátækraváða. Og fyri at kunna samanbera húski er neyðugt at umrokna tøku inntøkuna til eina javnvirðisinntøku fyri húski. Hagstovan brúkar javnvirðisinntøku eftir reglunum hjá ES, sum byggja á OECD ásetingar. Tað er, at tann fyrsti vaksni telur 1, næsti vaksni telur 0,5, og børn undir 14 ár telja 0,3.

Fyri 2013 er markið fyri, nær ein er í fátækraváða, ein roknað javnvirðisinntøka á 128.088 kr. Ein stakur uppihaldari við tveimum børnum skuldi tí hava eina tøka inntøku størri enn 128.088*(1+0,3+0,3) = 204.940 kr. fyri ikki at vera í fátækraváða.

Kristina Háfoss
*Landsstýriskvinna í fíggjarmálum*